Kyndil-Stjørnan 17-24(8-13)

# Stjørnan tók sær av løttum

**Oddaliðið Stjørnan tók sær av løttum, tá ið tær fríggjakvøldið vitjaðu Kyndil í Havn. Uttan at imponera vann oddaliðið trygt**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Kvinnurnar hjá Kyndli og Stjørnuni fingu gott høvi at læra hvørjar aðrar at kenna í farnu viku, tá ið tær dystaðust tvær ferðir innan tveir dagar. Mikukvøldið hittust liðini bæði í Klaksvík, og fríggjakvøldið var dystur leiktur í høllini á Hálsi.

### Einki ivamál

Tað sást beinan vegin, at talan var um tvey lið úr ávíkavist toppinum og botninum í Sunset-kappingini. Gamaní var Kyndil á odda 2-1, men tað var tað. Oddaliðið úr Klaksvík var snøgt sagt betur á øllum plássum, og longu tíðliga í dystinum løgdu tær seg avgerandi á odda.

Eftir at tað hevði staðið á jøvnum 3-3, tá ið seks minuttir vóru leiktir, fóru gestirnir frá Kyndli, og næsta korterið fingu tær tryggjað sær eina leiðslu upp á fimm mál, og so var dysturin í veruleikanum avgjørdur.

Hjá oddaliðnum kundu tey fríggjakvøldið samstundis fegnast um, at Annika Ljósstein av álvara er við at koma fyri seg eftir skaðasteðg, og tað er uttan iva ein góður styrkur, nú farið verður undir avgerandi partin av kappingarárinum.

Sum áðurnevnt tryggjaði Stjørnan sær tíðliga í dystinum eina avgerandi leiðslu, og tá ið komið var til hálvleiks, vóru gestirnir á odda við fimm málum 13-8. Eftir steðgin setti oddaliðið ferðina eitt sindur niður, og hetta gjørdi tað møguligt hjá teimum grønu úr Havn at fylgja eitt sindur betur við Stjørnuni, uttan at tær tó nakrantíð fingu hálað inn á tær.



*Við sínum seks málum var Joan M. Djordjevic toppskjútti hjá Stjørnuni, tá ið tær fríggjakvøldið vunnu á Kyndil í høllini á Hálsi í Havn.*

*savnsmynd*

## FAKTA

**Kyndil-Stjørnan 17-24(8-13)**
**Kyndil:** Ann-Mari Wang 7(3), Randi Wardum 6(1), Linda Weihe 2, Kari-Ann Petersen 1, Hildur Mikkelsen 1
**Stjørnan:** Joan M. Djordjevic 6(1), Anna Kristina Samson 4, Annika Ljósstein 4(2), Beinta Joensen 3, Una Olsen 3, Bára Skaale Klaksstein 2, Katarina Stjepanov 2
**Brotskøst:** Kyndil 4(4), Stjørnan 5(3)

## Máltindarnir

| | | |
|---|---|---|
| Kvinnur | | |
| Nicoleta Radu Hansen | Søljan | 121 (15) |
| Ioana Rápa | VÍF | 98 (25) |
| Daiva Tuomaite | VB | 84 (28) |
| Simona Petersen | Neistin | 82 (15) |
| Randi Wardum | Kyndil | 66 (14) |
| Lina Andriulyte | Søljan | 65 (7) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 59 (3) |
| Sunfríð B. Jacobsen | StÍF | 56 (23) |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 53 (9) |
| Heidi Maria Akselsen | Søljan | 51 |
| Marjun Tróndarson | Neistin | 49 (7) |
| Rannvá Augustinussen | VB | 48 (1) |
| Vesna Tomajek | Tjaldur | 46 (21) |
| Poula D. Olsen | StÍF | 45 |
| Ása Dam á Neystabø | Neistin | 44 (2) |
| Menn | | |
| Ingi Olsen | VÍF | 77 (21) |
| Agnar Joensen | VÍF | 62 (2) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 62 (4) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 62 (7) |
| Damir Oros | Neistin | 60 (12) |
| Áki Mørk | Neistin | 58 (7) |
| Josef Abrahamsen | Kyndil | 56 (12) |
| Piti Negru | H71 | 55 (4) |
| Henrik Gerster | H71 | 53 (6) |
| Høgni Klein | Kyndil | 49 (2) |
| Leivur Justinussen | StÍF | 48 (8) |
| Jakob Jónsson | Kyndil | 47 (1) |
| Regin Petersen | KÍF | 47 (4) |
| Alexandur Johansen | StÍF | 39 (13) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 36 (6) |

VB-Tjaldur 40-13(21-4)

# Sorl í Vági

**Talan gjørdist um rættuligt sorl, tá ið Tjaldur um vikuskiftið var og vitjaði VB í Vági. Vágskvinnur vunnu stórsigur 40-13**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var ongantíð nakar ivi um, hvat var betra liðið, tá ið botnliðið Tjaldur um vikuskiftið vitjaði ein av FM-kandidatunum VB í Vági. Dysturin millum liðini bæði prógvaði týðuliga, hvussu stórur munur er á toppinum og botninum í Sunset-kappingini, og tað er neyvan at taka munnin ov fullan at siga, at stórsigurin hjá VB kundi verið enn størri, um tær ikki settu ferðina eitt sindur niður í seinna hálvleiki.

### Avgjørt beinanvegin

Dysturin var ikki serliga gamal, so var hann longu avgjørdur. Vágskvinnur settu ferð á frá fyrsta bríksli, og tá var trupult hjá gestunum at fylgja við. Kvinnurnar úr Runavík blivu snøgt sagt runnar um koll, og at munurin var stórur á liðunum báðum, sást beinan vegin, tí longu aftaná tíggju minuttir hevði heimaliðið lagt seg á odda við sjey málum, 9-2, og so var dysturin í veruleikanum avgjørdur.

Heimaliðið setti ikki ferðina niður fyri steðgin, og neyðars Lone í málinum hjá Tjaldur hevði nokk at gera við at heinta bóltin úr meskunum. Ikki færri enn 21 ferðir bleiv bólturin sendur framvið henni í fyrra hálvleiki. Í hinum endanum er synd at siga, at Asta í VB-málinum bleiv skotin heit, og bert fýra ferðir eydnaðist tað Tjaldur at fáa skorað fyri steðgin. Tískil hevði VB eina risaleiðslu 21-4 í hálvleikinum. Í seinna hálvleiki helt VB fram við sínum spæli, og munurin bara vaks. Men um miðjan seinna hálvleik setti heimaliðið ferðina eitt sindur niður, og tá hepnaðist betur hjá Tjaldur, sum seinasta korterið fekk yvir helvtina av sínum 13 málum í dystinum.

## FAKTA

**VB-Tjaldur 40-13(21-4)**
**VB:** Rannvá Augustinussen 10(1), Gurið Mortensen 9, Aukse Vysniaskaite 5(1), Margreth Augustinussen 4, Sólrun Krosslá 3(1), Daiva Tomaite 3, Laila Jespersen 3, Christina Holm 2(1), Jóna Thorsteinsson 1
**Tjaldur:** Mona Langgaard 3, Jacoba Langgaard 2, Heidi Hansen 2, Kristine Ellingsgaard 2, Hansa Mikkelsen 2, Anna Hansen 1, Kirstin Jacobsen 1
**Brotskøst:** VB 4(4)
**Útvísingar:** Tjaldur 2
**Dómarar:** Kári Niclasen og Birgir Dimon

SUNSET KAPPINGIN

KVINNUR

| | dystir | v | - | j | - | t | v. mál | t. mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 10 | 10 | - | 0 | - | 0 | 267 | 198 | 69 | 20 |
| 2 VB | 10 | 9 | - | 0 | - | 1 | 309 | 192 | 117 | 18 |
| 3 Neistin | 11 | 8 | - | 0 | - | 3 | 321 | 233 | 88 | 16 |
| 4 Søljan | 11 | 6 | - | 0 | - | 5 | 313 | 261 | 52 | 12 |
| 5 VÍF | 11 | 5 | - | 0 | - | 6 | 266 | 249 | 17 | 10 |
| 6 StÍF | 10 | 2 | - | 1 | - | 7 | 215 | 261 | -46 | 5 |
| 7 Kyndil | 11 | 1 | - | 1 | - | 9 | 197 | 312 | -115 | 3 |
| 8 Tjaldur | 10 | 0 | - | 0 | - | 10 | 177 | 359 | -182 | 0 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

MENN

| | dystir | v | - | j | - | t | v. mál | t. mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 10 | 8 | - | 0 | - | 2 | 308 | 238 | 70 | 16 |
| 2 VÍF | 10 | 7 | - | 1 | - | 2 | 295 | 259 | 36 | 15 |
| 3 H71 | 10 | 4 | - | 1 | - | 5 | 297 | 293 | 4 | 9 |
| 4 KÍF | 10 | 4 | - | 0 | - | 6 | 241 | 271 | -30 | 8 |
| 5 StÍF | 10 | 3 | - | 0 | - | 7 | 267 | 303 | -36 | 6 |
| 6 Neistin | 10 | 3 | - | 0 | - | 7 | 268 | 312 | -44 | 6 |